# Í Føroyum er ikki verandi




**Fyri at fáa eitt vanligt lív skifti eg tjóð, í Føroyum er ikki verandi hjá samkyndum, og tí eru míni ráð til øll ung samkynd: Flyt úr Føroyum! Eg havi tað sum blomman í egginum, var eg verandi í Føroyum og var eitt sindur veikur, var eg kanska giftur við einum konufólki nú"**

FØROYINGUR Í DANMARK
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fróði Holm Knudsen flutti 18 ára gamal til Danmarkar. Hetta var fyrst í 80'árunum. Hann flutti fyri at kunna fáa ein vanligan ungdóm sum samkyndur. Nú 25 ár seinni hittið eg tann (sambært honum sjálvum) 28 ára gamla Fróða í Keypmannhavn. Hann tykist nøgdur við lívið og sigur, at hann elskar at búgva á Frederiksberg.

### Skrivar um undirhald

Fróði arbeiðir á danska dagblaðnum BT, har skrivar hann um undirhald. Vit hittast týskvøld, tí mikudag og hósdag verður hann í London, har hann skal til undanfrumsýning av nýggja King Kong filminum. Hann skal gera eina samrøðu við leikstjóran Peter Jackson og onkran av sjónleikarunum, ið spæla við filminum. Hann greiðir frá, at hann hevur arbeitt við at skriva um undirhald nú í fýra ár. Honum dámar hetta væl, men hann ætlar sær skjótt at fara undir at lesa enskt á univeristetinum. Hann hevur lisið heimsspeki og franskt fyrr og er journalistútbúgvin av journalistháskúlanum í Århus. Meðan hann læs, var hann í starvsvenjinig á BT og fekk fast starv har aftan á loknan lestur. Á blaðnum hevur hann fingist við øll møgulig øki: "alt uttan ítrótt, tí tað interesserar meg slett ikki", sigur hann

### Samkyndur formaður í Danmark

Fróði er formaður í felagsskapinum Friðarboganum, ið er felagskapurin hjá teimum samkyndu í Føroyum. Eg spyrji hann, um hann ikki heldur, tað vera løgið, at formaðurin í felagsskapinum hjá føroyskum samkyndum býr í Danmark. Hetta heldur hann ikki, "Jú, kanska í eini ideellari verð, har vit samkyndu eru góðtikin og elskaði í Føroyum. Tá hevði tað verið løgið at havt ein útiseta sum formann, men í hesi verðini búgva 90% av teimum føroyingum, ið eru opnir um, at teir eru samkyndir, uttanlanda." svarar Fróði.



### Skifti tjóð

"Fyri at fáa eitt vanligt lív skifti eg tjóð. Í Føroyum er ikki verandi hjá samkyndum, og tí eru míni ráð til øll ung samkynd: Flytið úr Føroyum! Eg havi tað sum blomman í egginum á Frederiksberg, varð eg verandi í Føroyum, og var eg eitt sindur veikur, var eg kanska giftur við einum konufólki nú", sigur Fróði og vamlast sjónliga (til stuttleika) við tankan, "Hugsa tær at vera saman við einum konufólki, puha" sigur hann og flennur.

### Útspiltur og álopin

"Sum ungur samkyndur hevur tú ongan møguleika fyri at liva eitt vanligt lív í Føroyum. Tú verður útspiltur og eisini álopin, men ringast av øllum er, at tú fært ikki livað, tað fríða óbindandi kynslívið, sum hoyrir ungdóminum til. Tí antin eru tínir potentiellu sekspartnarar ikki sprotnir, ella eru teir ikki í Føroyum. Eingin eigur at ofra sín ungdóm og ganga runt í Føroyum og verða útspiltur. Tað er ikki rætt, tí er best at fara. Eg veit væl hetta er syndarligt. Tí eitt lítið land sum Føroyar hevur ikki ráð at missa eina einastu heilakyknu.", sigur Fróði.

### Eg vil vera elskaður

Hann greiðir frá, at hann flutti heim aftur stutt eftir, at hann var fluttur niður. "Mamma vildi hava meg